## Skrivari/hjálparfólk til kommunulæknaviðtalu

Eitt starv sum hjálparfólk 3/4 ella fulla tíð er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Sjúkrasystir hevur fyrimun.

**Førleikar:**
• Teldukunnleika á basalum støði
• Vitan innan heilsurøkt
• Vera fyrikomandi

**Løn:**
Tosa vit um.

Freistin at søkja er úti 15. jan. 2008. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til tlf. 51 37 00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum kunnu sendast til:

Kommunulækni
Kári Jacobsen
J. Paturssonargøta 22
100 Tórshavn

## Ogn til sølu

Ognin á matr. 2006 Í Toftum í Vági, verða hervið lýst til sølu. Talan er um sethús, har 1. hædd er innrættað sum handil uml. 100 m2. Hølini eru vælegnað til handil, goymslu, skrivstovu osfr. Handilshølini eru í góðum standi. 2. hædd er stór íbúð uml. 140m2 við 4 kømurum, 1 wc, stovu og køk í einum og fýrrúmi. Íbúðin krevur ymiskar ábøtur. Somuleiðis krevja húsini uttan ymiskar ábøtur.

Ognin verður bert seld um hóskandi boð fæst.

Um ognin ikki verður seld, verður 1. hædd handilshøli, boðin út til at leiga frá uml. 1. august 2008 at rokna.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Sp/F Í Toftum**
v/Árna D. Brattaberg
Postboks 141
FO-910 Vágur
Fart. 214906
e-mail: brattin@post.olivant.fo

SUNDA KOMMUNA

## Kommunustýrisfundir 2008

Bygdaráðið hevur á fundi tann 17.12.2007 samtykt at áseta almennu fundirnar hesar dagar.

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagin | 28. januar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 25. februar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 31. mars | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 28. apríl | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 26. mai | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 30. juni | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 25. august | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 29. september | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 27. oktober | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 10. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 24. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 15. december | kl. 19.00 |

SUNDA KOMMUNA

## Pedagogar til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir:**
• 1 pedagogi umleið 30t um vikuna til vøggustovuna Ennið
• 1 pedagogi 25 t um vikuna til frítíðarskúlan at byrja 1 februar ella eftir nærri avtalu.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
***Virðing-tryggleika-umsorgan-ymiskleika og nærveru***

**Er hetta nakað fyri teg, hevði tað glett okkum at frætt frá tær.**

**Setanarviðurskifti:**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

**Meira fæst at vita** við at ringja til Rosu Prestá leiðara á tlf 471030/771030 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf 471034

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 17 januar 08 og sendast til:

Dagstovnurin á Flatinum
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

ella við telduposti til: dagstoyr@post.olivant.fo

**Um stovnin:**
Vit eru 88 børn í aldrinum 0 – 10 ár og 23 starvsfólk. Opið er frá 7.15- 17.15. Stovnurin er skipaður í 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og 1 frítíðarstova. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar bæði innan og uttandura, hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, umframt eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstova og ymisk verkstøð. Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum busssambandi.

SUNDA KOMMUNA

## Skattalistin
### fyri árið 2006

liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð.

**frá 7. til 18. januar 2008 báðir dagar íroknaðir.**

## Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir pedagogum bæði til vøggustovu og barnagarð at byrja 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu. Møguleikar eru fyri parttíðarstarvi.
Á stovninum eru 2 vøggustovur,
3 barnagarðsstovur og ein forskúli.

Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.

Dagstovnurin er ein sjálvsognarstovnur við eini 5 manna nevnd, har trý eru politiskt vald, og tvey eru foreldraumboð.

**Umhvørvið rundanum Dagstovnin á Argjum**
• Beint við er hagin við alskyns møguleikum
• Sandá rennur framvið, og Sandagerð er tætt við
• Bussleið 2 steðgar við stovnin

**Stovnurin leggur dent á at bjóða**
• Ein pedagogik, har dentur verður lagdur á menning og avbjóðing
• Virðing og trivnað, bæði hjá børnum og vaksnum
• At stovnurin er opin og jaligur um framtíðina og broytingar
• Forskúla og gott samstarv við skúlan

**Hvat siga starvsfólkið um stovnin**
• Vit hava fakliga mennandi avbjóðingar
• Vit eru við til at seta dám á stovnin
• Vit síggja virðing, dygd og menning aftur í gerandisdegnum

**Hvat kunnu vit bjóða tær**
• Eitt starv har tú kanst hava ávirkan
• Eitt starv har tú kanst nýta tínar dygdir og samstundis menna teg sjálva(n)
• Eitt starv har vit líta á teg, so tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
• Eitt starv har dentur verður lagdur á opinleika

**Krøv til tín**
• At tú ert námsfrøðingur
• At tú hevur fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
• At tú trívist við at arbeiða sjálvstøðugt
• At tú hevur góð samstarvsevnir
• At tú ert framfýsin

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara, á telefon 219019 ella at ringja 319019 lokal 10.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argjum og vera okkum í hendi í seinasta lagi **leygardagin 26. januar 2008. kl. 12.00**

## Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval **hósdagin 07. februar 2008** í Vestmanna og Kollafjarðar umdømi.

Uppskot til umboð – 3 fyri Vestmanna og 2 fyri Kollafjarðar umdømi – skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi **24. januar 2008.**

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**
Á Miðgerði 19
410 Kollafjørður